# Til minnis um Beintu Bærendsen Strøm

## 06.05.1979 – 05.09.2002

Tað vóru svár tíðindi at fáa tann tórsmorgunin, at tú góða Beinta, var farin. Vit vistu, hvønn veg tað bar, men tað ger tað ikki lættari. Tú hevur jú verið ein partur av mínum lívi so leingi eg kann minnast, og einki kundi fyrireika meg uppá tað tómrúm, ið nú er eftir teg.

Nógv eru minnini um teg, Beinta góða, bæði úr Valinum og úr Syðrutoftum. Sum smágentur spældu vit saman so at siga hvønn dag, og tað var ikki heilt sjáldan, at vit eisini svóvu saman. Eins og aðrar smágentur høvdu vit stórar vónir um, hvussu lív okkara skuldi vera, tá vit blivu vaksnar.

Eitt summari vóru vit báðar og familjur okkara og ferðaðust saman. Vit fóru øll til Eysturríki, og hetta høvdu vit báðar glett okkum til leingi. Vit plagdu at sita á reiggjunum í garðinum hjá Groth og ímynd okkum, hvussu hendan ferðin fór at verða, og hvussu alt var í hesum landi, ið vit skjótt skuldu vitja.

Hvør skuldi trú, at lagna tín skuldi gerast so hørð, góða Beinta. At tú, bara ellivu ára gomul, skuldi gerast so álvarsliga sjúk. Men tú var sterk og hevði viljan til lívið, og tú kláraði teg gjøgnum hesa óhugnaligu sjúku tveir ferðir í tínum unga lívi. Hóast alt ikki altíð var lætt hjá tær, so var tú altíð líka smílandi og blíð, tá vit vóru saman. Og tú settist ikki aftur. Eitt tíðarskeið var tú í Danmark á skúla, og har dámdi tær sera væl.



Men í mei í ár komu so hesi ringu boðini aftur, at tú, góða Beinta, aftur var vorðin sjúk. Hetta varð staðfest á Ríkissjúkrahúsinum, men hesaferð orkaði tú ikki meira góða. Tí avgjørdi tú at takka nei til viðgerð, ið helst ikki hevði hjálpt, og valdi ístaðin at koma heim til Trongisvágs at vera, tað sum eftir var av tínum alt ov stutta lívi. Hetta var ein sera tung avgerð, ið krevur eina ótrúliga styrki, og hóast eg heldur vildi havt teg her hjá mær, so skilji eg teg so sára væl. Tú hevði verið gjøgnum so nógv, og nú orkaði tú bara ikki meira góða.

Men hóast tú var tikin frá okkum alt ov tíðliga, so náddu vit báðar at fáa nógv góð minni saman gjøgnum árini, og tey skal tú hava stóra takk fyri Beinta góða. Hesi minni eru tann dýrabærasti skattur, eg eigi í dag. Tey eru mær en góð troyst, nú tú ikki ert her meira, og fari eg altíð at goyma teym væl í mínum hjarta.

Og tú, góða Solveig. Tú hevur mist tað dýrabærasta, tú átti. Tit hava verið gjøgnum so nógv saman báðar. Tú var tann sterki kletturin, ið Beinta hevði at styðja seg at, tá harðast stóð á. Má Gud vera hjá tær og troysta og styrkja teg í tíni stóru sorg góða.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um vinkonu mína Beintu Bærendsen Strøm.

Góða Elskaða Beinta, takk fyri alt.

**Jónleyg**

Móttøka
MBM
25 ár

*Friggjadagin tann 25. oktober eru 25 ár síðani Mjólkavirkið Búnaðarmanna varð stovnað*

*Í hesum sambandi bjóðar MBM øllum viðskiftafólkum til móttøku á Mjólkavirkinum í Hoyvík frá kl. 15.00 - 17.00 friggjadagin*

*Tad vildi glett okkum at sæð tygum til móttøkuna*

MBM
Meginfelag Búnaðarmanna

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum sum mintust meg á 80 ára degnum 19. sept.

Heilsan
**William Hansen, Klaksvík**

## Minningarorð um
# Beintu Bærendsen Strøm

Tað gekk so skjótt, trúði ikki at tað fór at ganga so skjótt. Men nú tá eg hugsi um tað, so var tá nú nógv tri fyri teg, góða. Sjálvt um eg visti, at tú fór at doyggja, so kom tað stadigvekk sum eitt sjokk, at tú var farin. Hevði ynskt, at eg var har og hevðif ingið sagt tær farvæl, eitt ordiligt farvæl. Sagt tær, at títt lív ikki var fyri einki og at eg aldrin fari at gloyma teg.

Tú var ein av teimum fyrstu, eg kom at kenna tá eg flutti suður. Vit spældu nógv saman, men bert eitt hálvt ár aftaná, so bleiv tú sjúk fyrstu ferð. Sum lívið er órættvíst og lagnan er so hørð við summi fólk. Men sjálvt um tú hevði so nógvan mótgang, so var tú altíð glað og smílandi alíkavæl. Og tú royndi sum frægast, og nógv fekst tú burtur úr. Tað er nakað okur øll burdu lært av, og ikki hvønn dag grenja um smáting. Ein meining er við øllum, eisini at tú er farin. Men tann grundin er slett ikki sjónlig fyri mær, eg síggi/finni hana ikki.

Sjálvt tá tú lá at doyggja, so var tað tú sum troystaði tey, ið fóru at sita eftir. Og tað krevur styrki, og tað hevði tú nógv av, tú sum hevði verið ígjøgnum so nógv. Ikki var tú bangin fyri at doyggja heldur, tí tú visti at tú fór til eitt betri stað, har eingin pína var. Eg veit, at tú er saman við pápa tínum í himlinum nú, og hyggur av og á niður til okkara.

Eg sendi tær eitt bræv dagin áðrenn tú fór heim, góða, men tað kom ikki framm til tíðina. Men eg veit, at tú nú veit, hvat stóð í tí.

Sum tað verður løgið at koma heim til jólar og vita at tú ikki er har meira, ikki skula niðan við jólapakka til tín.

Ein heilsan til Solveig. Mínir tankar leita ofta til tín, kann ikki fyristilla mær hvussu tú hevur tað. Jesu pápin styrki teg og hjálpi tær gjøgnum hesa longu sorgarfullu tíð. Minst til at nú hevur hon tað gott, og at einaferð samlast tit øll aftur.

Við hesum fari eg at lýsa frið yvir minnið um vinkonu mína Beintu Bærendsen Strøm. Hvíl í friði, kæra Beinta.

**Eyð-Britt**





# Føroya bylgja brýtur enn

**Fyrsti partur av Fairwaves, føroysku bylgjuni í Íslandi, er farin framvið og føroyingar hava veruliga gjørt vart við seg og føroyskan tónleik**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*Kári Sverrisson fekk sligið navn sítt fast og var stórliga fagnaður, eisini fyri sítt frálíka guitarspæl*

Fairwaves hevur rættiliga verið í ljósinum í Íslandi farnu vikuna. Mikudagin byrjaði tiltakið við konsert við Kára Sverrisson og Mikael Blak, Hanus G. Johansen og Eivør Pálsdóttir. Kári fekk sligið navn sítt fast og var stórliga fagnaður, eisini fyri sítt frálíka guitarspæl.

Hanus er nógv spældur í útvørpum og hansara framførslur, eins og persónurin sjálvur, skapa ofta virðing og bergmál, og so var eisini hesaferð. Eisini tá hann leikti íslendska lagið Fatlafól hjá Bubba Mortens. Tá sungu øll við. Hanus prátaði nógv á føroyskum millum løgini, og føroyski frásigarin, Sólarn, prátaði eisini á føroyskum og gav hetta konsertini serstakan dám.

Eivør er kend og væl dámd í Íslandi. Saman við íslendskari manning hugtók hon. Hon sang av síni fløgu og eisini okkurt íslendskt, m.a. lagið Augun ”ín”.

Væl gekk við fløgusøluni hjá øllum føroysku tónleikarunum.

Jens Guð, tónleika- og føroyahugaður íslendingur, sigur, at hann hitti dana eftir konsertina, sum hevur nógv við tónleik at gera, m.a. Roskilde Festivalin. Hann gleddist um undanvindin hjá føroysku tónleikarunum í Íslandi.

Leygardagin spældi Clickhaze og A.R.T, saman við Mikael Blak, í Kópavági. Væleydnað konsert, har Clickhaze hevði atdráttarmegina. Eftir middnáttina vóru tað Clickhaze og Krit, ið framførdu. Væl gekk eisini hjá Krit við teirra tunga tónleiki.

Næsta vikuskiftið verða konsertir við Clickhaze og Krit á Austurbæjarbio. Fjølmiðlar hava havt úr at gera við at hitta føroysku tónleikararnar og umboð teirra.

Føroyska bylgjan hevur enn ikki lagt seg í Íslandi og tykist alt annað enn viknað í megi.

HEYST TILBOÐ
Nýheimkomnar troyggjur
ymisk snið/litir
419,- 399,- 299,-
tak nú 2 fyri
399,-
Tilboðini eru galdandi:
Seytjan
í Klaksvík Tel. 456517
í Tórshavn Tel. 311305

# Fotoframsýning endar

LIST
*Ingrid Bjarnastein*

Í dag endar fotoframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Um vikuskiftið hevur Anna Katrina Højgaard sýnt fram fotomyndir og málningar, sum hon sjálv hevur staðið fyri.

Anna Katrina hevur arbeitt nógv við fotografering. Hon fór í læru sum 17 ára gomul, og hevur fingist við hetta síðani tá. Nú hevur hon eisini latið upp sítt egna fotogallarí uppi í Hákunargøtu í Hoyvík.

Myndirnar eru tiknar í Danmark og uppi í gallaríinum í Hoyvík.

Framsýningin byrjaði fríggjadagin og letur aftur í dag, týsdag



*Anna Katrina Højgaard hevur um vikuskiftið havt fotoframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hon hevur annars eisini júst latið upp egið fotogallarí í Hoyvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum
HEYSTTILBOÐ



SIEMENS C45
Liggur sera væl í hondini, hevur stóran skíggja og stórar knøttar. Vibrator, ymiskar frontar, wap, innbygt mótald, spøl og mangt annað
einans 1099 kr.

NOKIA 3410
Tann nýggja smarta frá Nokia. Sera brúkaravinarlig við øllum hentleikum. Ymiskar frontar, wap, spøl og mangt annað
einans 1399 kr.

Ericsson R600
Ein tann sneggasta frá Ericsson. Hevur umframt kendu stýriskipanina, innbygt mótald, wap, stoppur, vibrator spøl og mangt annað
einans 1649 kr.

TELEBÚÐIN
Tórshavn 317010
Norðstreymoy 421000
Miðvágur 332000
Klaksvík 457488
Sandur 361000
Tvøroyri 371000
Saltangará 404400